## Ferðslulógin broytast

1. juli í ár, altso um tríggjar vikur, verður føroyska ferðslulógin broytt nakað. Broytingarnar snúgva seg í høvuðsheitum um trý ting. Tey trý tingini eru, at forboð verður sett ímóti lítlum breytmotorsúkklum ella teimum sokallaðu “pocketbikes,” at revsingin fyri at koyra við yvirvekt við tungum akfari verður nógv herd, og at trygdarreglurnar fyri koyring við motorsúkklu verða herdar. Hesar broytingar snúgva seg serliga um børn á motosúkklu. Frá 1. juli skulu børn verða fylt átta ár, um tey skulu ferðast á motorsúkklu, og tey skulu vera í fastspentum hjálmi.



## Til Klaksvíkar fyri 10 kr.

Sáttmáli er nú komin í lag millum Klaksvíkar kommunu og Strandfaraskip Landsins um kostnaðin á Kalsoyarleiðini. Hesin nýggi sáttmálin ger, at borgarar í Kalsoynni sleppa til Klaksvíkar fyri 10 kr. Sáttmálin fevnir um allar íbúgvar á Kalsoynni, ið eru borgarar í Klaksvíkar kommunu. Somu borgarar fáa allir útflýggjað eitt samleikaprógv, ið skal vísast við fráferð. Upphæddin, sum tey ferðandi gjalda við fráferð er 5 kr. fyri børn 15 ár og yngri, meðan ung 16 ár og eldri gjalda 10 kr. fyri túrin.

# Musikkskúlanæmingar bjar

**Um mánaðarskiftið mai-juni var skúlakonsert í Nólsoy, frásøga við Niels-Jákupi, ið fann urið í Fámjin og tónleikur í Miðlahúsinum og frásøga við Jógvani við Keldu og tónleikur í Leirvíkar Bátasavni. Hetta vóru tiltøk, sum góvu fólki upplivingar í nútíð og farnari tíð, bæði í frásøgu og tónleiki**



*Stívliga 70 fólk vóru til tiltakið á Leirvíkar Bátasavni og eini 50 fólk til tiltakið í Miðlahúsinum*

TILTØK
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Í døgum 31. mai til 6. juni hevði violinisturin, Monika Stauss Joensen, sum er gift í Leirvík, vitjan úr heimlandi sínum, Sveits. Tað var systirin, Andrea Stauss Hofman, ið spælir klaver, sum var á vitjan.

Meðan Andrea var í Føroyum, løgdu tær til rættist tríggjar ymiskar konsertir, sum tær "kryddaðu" við spæli og frásagnum.

### Skúlakonsert

Fyrsta tiltakið var ein skúlakonsert í Nólsoy, fríggjadagin 1. juni – longu morgunin eftir, at Andrea skuldi koma til Føroyar kvøldið fyri. Men, sum so ofta um summarið, vóru floglíkindini ikki til vildar.

Flogfarið hjá Atlantsflogi, sum Andrea og italsku fjeppararnir til landsdystin Føroyar-Italia vóru við, endaði seint hóskvøldið í Íslandi.

Tá Andrea ikki var frammi til ætlaðu tíðina í Føroyum, tók ivi seg upp um tiltakið, sum skuldi vera í Nólsoy morgunin eftir. Nú mátti ferðin til Nólsoyar antin avlýsast, ella mátti skráin fyri tiltakið leggjast um.

Eftir nógvar telefonsamrøður millum Moniku Stauss Joensen og Hilmar Joensen, lærara við Nólsoyar skúla, vóru boðini úr Leirvík klokkan 22.30 kvøldið fyri tiltakið: “Vit koma kortini… “

Í staðin fyri Andreu, sum fyribils var endað í Íslandi, fekk Monika í lag at taka 7. flokk úr Leirvíkar skúla við sær til Nólsoyar.

Fríggjamorgunin vóru soleiðis tríggir bilar við 10 næmingum á veg til Havnar fyri at náa Rituna til Nólsoyar klokkan 9.30.

Tað vísir seg nevniliga, at 7. flokkur við Leirvíkar skúla er ein fram úr tónleikaflokkur, har ikki færri enn 8 av 10 næmingum ganga til tónleikaundirvísing.

Soleiðis “bjargaðu” hesir næmingarnir tiltakinum í Nólsoy, so børnini har ikki noyddust heim aftur úr skúlanum við ongari skúlakonsert, sum tey høvdu glett seg til.

Í Nólsoy var mangt og hvat á skránni – alt frá violinduettum, violinløgum saman við fylgispæli, guitarsolo, klaverboogie og kórsangi, sum Dánjal Eysturstein leiddi. Eisini var felagssangur við guitarspæli hjá Hilmari Joensen.

Ljósmyndir úr Sveits vórðu sýndar, og ein klovnur var eisini knappliga við í tiltakinum.

Fjølbroytta løtan í skúlanum í Nólsoy við tónleiki, sangi og undirhaldi eydnaðist sera væl, og úr Nólsoy frætta vit, at tiltakið helst fer at standa sum eitt minnið fyri lívið hjá skúlabørnunum í bygdini.

Eftir drúgvu ferðina hjá Andreu Stauss Hofman heim til Føroya, vóru systrarnar báðar klárar til konsertirnar, ávíkavist 3. juni í Miðlahúsinum í Vágsbotni og mánadagin 4. juni í Leirvíkar Bátasavni.

Hesi bæði tiltøkini vórðu væl vitjað. Umleið 50 fólk vóru í Miðlahúsinum og stívliga 70 fólk í Bátasavninum.

### Niels-Jákup og urið

Í miðlahúsinum spældu tær báðar verk eftir Corelli, Dancla, Tchaikowsky og sigoynaraløg eftir Csoka og Sarasate.

Monika framførdi eisini eitt lag fyri violin-solo, ið hon hevur fingið sendandi úr Wien frá Elzbieta Wiedner-Zajac, sum Konsertfelagið hevði á vitjan í februar.

Elzbieta sendi Moniku, sum er formaður í Konsertfelagnum, hetta lagið sum takk fyri áhugaverdu ferðina í Føroyum.

Í kaffisteðginum í Miðlahúsinum høvdu fólk høvi at royna ein sveisiskan spesialitet, eina sokallaða “ostafondue”. Flestu, sum komin vóru á lýða á, nýttu høvi at “dippa” sær ein fransbreyðbita í heitu ostagrýtuna.

Fólk fingu eisini kaffi og okkurt afturvið.

Eftir steðgin greiddi Niels-Jákup, ið var drongurin, sum fann nógv umrødda urið í fjøruni í Fámjin, frá hesi hendingini. Saman við mammuni, Onnu, var hann partur av tiltakinum í Miðlahúsinum hendan dagin.

Niels-Jákup segði, at abbin, sum var við honum hendan dagin, tá hann fann urið, helt fyri: “Abbi ivaðist í, um hetta mundi vera ein bumba, sum lá í eskjuni, men tað helt eg ikki…”

Tað var áhugavert at hoyra Niels-Jákup og síggja myndirnar, sum gjørdu frásøgnina sera livandi.

Einki er at ivast í, at urið, sum hann fann í fjøruni, hevur givið Niels-Jákupi og familju hansara nógv upplivilsir, ikki minst ferðin á urmessuni í Sveits í apríl.



*Jógvan við Keldu dugdi sera væl at siga frá um farnar dagar á Keldu í Leirvík*

### Við Keldu

Í hugnaliga Bátasavninum í Leirvík hevði Jógvan við Keldu, sum sjálvur hevur røtur í Leirvík, hugleiðingar um barnadagar á Keldu í Leirvík.

Jógvan dugdi sera væl at siga frá, og tað var áhugavert at hoyra hansara frásøgn um øll tey persónligu minnir, hann hevur úr Leirvík.

Gomlu myndirnar søgdu eisini sína søgu um umhvørvið og staðið á Keldu.

Hetta er ein farin tíð, men hon er ikki gloymd millum tey, sum vóru partur av henni. Jógvan dugdi so sera væl at fáa lív í søguna aftur og gera alt so “sjónligt” fyri teimum, sum komin vóru at lýða á.

Tiltakið í Leirvíkar Bátasavni var eisini kryddað við violin-og klavertónleiki hjá systrunum Moniku og Andreu.